# Suðuroyggin kann fáast á føtur

**– Vit hava stórar trupulleikar í Suðuroynni í løtuni. Men vit hava eisini stórar møguleikar at fáa oynna á føtur aftur og teir skulu vit at brúka sigur nýggi stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren Lünell Bruhn**

ØKISMENNING
*Àki Bertholdsen*
*aki@ssialurin.fo*



*– Fyri nøkrum árum síðani var Suðuroy feskfiskaoyggj nummar eitt í Føroyum. Og tað kann og gerast aftur, sigur nýggi stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren Lünell Bruhn. Hann ætlar at Suðuroyar Sparikassi skal hava ein virknan leiklut í royndunum at fáa Suðuroynna aftur á føtur*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

– Vit skulu ikki hongja okkum so nógv í tær forðingar, sum eru. Vit skulu heldur síggja tær avbjóðingar og teir møguleikar, vit hava.

Orðini eigur nýggi stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren Lünell Bruhn.

Hann tók við stjórastarvinum á nýggjárinum, eftir at stjórin seinastu 19 árini, Mikkjal Sørensen, segði seg úr starvi í fjør.

Og nýggi stjórin ætlar ikki at sita hendur í favn. Tvørturímóti ætlar hann at Suðuroyar Sparikassi skal hava ein virknan leiklut í royndunum at fáa Suðuroynna á føtur aftur.

Hann ásannar, at tað verður ikki heilt lætt at lyfta arvin eftir Mikkjal Sørensen, sum nú er farin frá, tí hann menti Sparikassan ómetaliga nógv.

Men hann dylir kortini ikki fyri, at hansara mál verður at føra sparikassan enn longur framá.

Vit spurdu hann fyrst, hvørjar møguleikar hann metir, at ein lítil peningastovnur, sum Suðuroyar Sparikassi, hevur, nú vit javnan hoyra um peningastovnar, sum leggja saman fyri at verða størri so at teir kunnu standa seg í kappingini.

– Tað er rætt, at nógvir peningarstovnar leggja saman. Tað eru stovnar, sum stremba høgt og sum vilja gera seg galdandi á altjóða marknaðinum.

– Men tað eru eisini nógvir smáir peningastovnar ymsastaðni og nógvir av teimum ganga ikki so illa, hóast teir eru smáir. Tað eru peningarstovnar, sum meiri og minni liva av tí fólkagrundarlagi, sum er í nærumhvørvinum. Ein lítil peningastovnur sum Suðuroyar Sparikassi, kennir lokalsamfelagið sera væl. Og vit kenna eisini okkara viðskiftafólk sera væl og tí halda vit, at vit fáa givið teimum eina hollari og meiri persónliga ráðgeving.

– Og okkara viðskiftafólk eru eisini vælkomin inn í Sparikassan bara til at práta.

– Sostatt fáa vit givið okkara viðskiftafólki nakað, sum vit ikki halda, at tey fáa aðrastaðni og tað er ein av okkara stóru fyrimunum, sigur Søren Lünell Bruhn.

Men hann leggur so afturat, at av tí at sparikassin ikki er so stórur, hevur hann heldur ikki umstøður til at fíggja stórar verkætlaninr, og tað er tann størsti veikleikin hjá einum lítlum stovni.

Søren Lünell Bruhn sigur, at nú hann hevur tikið við sum stjóri, fer hann at leggja stóran dent á at varðveita og byggja út tað persónliga sambandið við viðskiftafólkini, sum undanfarni stjórin legði lunnar undir.

– Men so fari eg eisini at royna at gera Suðuroyar Sparikassa sjónligari. Eg vil fegin hava, at Suðuroyar Sparikassi, sum onkur norðanfjørðs hevur kallað eina lítla bankakiosk, gerst sjónligari í samfelagnum, so at enn fleiri taka sparikassan til sín.

Hvussu hann ætlar at gera tað, vil hann ikki siga so nógv um enn.

– Men vit hava ymsar ætlanir, sum ikki eru royndar í Føroyum fyrr, men enn fái eg ikki sagt, hvat tað er.

Samstundis arbeiðir Sparikassin við møguleikanum at lata onkra deild upp afturat, men tað er ikki avgjørt enn.

## Vakstrarhús í Suðuroy

Søren Lunell Bruhn ásannar, at Suðuroyggin stendur fyri stórum avbjóðingum í royndunum at fáa bilbukt við tí stóra arbeiðsloysi sum er og fyri at fáa gongd aftur í vinnulívið.

Og í hesum sambandi ætlar hann, at Suðuroyar Sparikassi skal hava ein virknan leiklut.

– Eitt er, at vit kunnu fíggjar ymsar vinnulívsætlanir. Men tess størri undirtøku, Sparikassin hevur ímillum fólk, tess betri verður hann førur fyri at fíggja vinnulív.

– Jú fleiri suðuroyingar ið stuðla Sparikassanum, tess meiri peningur verður at arbeiða við til frama fyri vinnulívið og privatu viðskiftafólkini. Brúka suðuroyingar tann lokala peningastovnin, verður peningurin verandi í oynni, heldur enn at verða sendur norðureftir.

Men Suðuroyar Sparikassi hevur eisini stovnað íløgufelagið Kveiking, ið eftir ætlan skal kunna seta meiri vágafúsan pening í burðardyggar vinnulívsætlanir.

Men stjórin í Sparikassanum hevur eisini ítøkiligar ætlanir um at virka fyri, at seta vakstrarhús á stovn í Suðuroy.

Her er talan um vakstrarhús í yvirførdum týdningi og hann greiðir frá:

– Suðuroyingar hava brúk fyri einum staði, har teir kunnu venda sær við hugskotum um vinnuligar ætlanir.

– Vit hava nógvir suðuroyingar við ymsum dygdum. Vit hava granskingardepil, vit hava fólk við skili fyri fígging, vit hava fólk við vinnuligum royndum, vit hava peningastovnar og í miðnámsskúlanum hava vit verkfrøðingar, lívfrøðingar, o.s.fr.

– Eg kundi hugsa sær, at vit gjørt eitt slag av eini miðstøð, har vit savnaðu allar góðar kreftir í Suðuroy, sum fólk, við góðum hugskotum kundu vent sær til.

– Serfrøðingarnir av ymsum slagi kundu so hjálpt til við vitan, hugskotum og leiðbeiningum um, hvussu viðkomandi kemur víðari við sínum hugskotum.

– Hevði tað so borið til at fingið Menningarstovuna til Suðuroyar einar tvær ferðir um mánaðin, hevði tað avgjørt bara verið ein fyrimunur.

Søren Lünell Bruhn sigur, at hetta kundi fingið nógv hugskot til at borið ávøkst og til at sæst aftur í ítøkiligum vinnuætlanum.

Hann heldur eisini, at Suðuroyar Syðra Vinnuráð eigur at verða umskipað.

– Eg fari at virka fyri, at vit fáa eitt vinnuráð fyri alla Suðuroyn og sum kann tala fyri alla oynna og ikki bara fyri syðru helvt ella norðarðu helvt.

– Hevði øll oyggin verðið savnað í einum slíkum vinnuráðið, hevði tað givið sjónarmiðjunum hjá ráðnum eina heilt aðra tyngd enn tað hevur, nú tað bara umboðar ein part í oynni.

## Skulu hugsa meiri um møguleikarnar

Stjórin í Suðuroyar Sparikassa ásannar, at vinnan í Suðuroy hevur stórar trupulleikar í løtuni. Men